ítróttur

Nr. 158 • týsdagur • 23. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fremad er á odda

**Enn eina ferð taldist Andrew av Fløtum millum málskjúttarnar og staðfesti harvið, at hann er sera væl fyri**




*Andrew av Fløtum ttykist vera í stórformi í løtuni. Aftur hetta vikuskiftið var hann millum málskjúttarnar hjá Fremad Amager, sum nú hevur lagt seg á odda í næst bestu donsku deildini*

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur sum eftir ánni hjá Andrew av Fløtum og eisini hjá Fremad Amager. Hesa ferð vóru teir á útivølli í Gladsaxe, har heiðurskrýnda AB legði rygg til 5-3 tap. Talan var um sera málríka og harvið undirhaldandi uppgerð. Eftir sigurin er Fremad Amager oddalið í næstbestu deildini, og fótbóltslagið á Amager er í toppi.

Fremad Amager var á odda 4-1 eina løtu, men tað gjørdist heilt spennandi aftur, tá ið heimaliðið minkaði um munin til 4-3, áðrenn Fremad Amager skoraði eina ferð afturat og harvið tryggjaði sær øll stigini og odddasessin í deildini.

Andrew av Fløtum javnaði til 1-1 í 6. minutti. AB setti hol á í 4. minutti, men so smeyg Andrew sær millum tveir mótstøðumenn við bóltinum, og so setti hann framvið málverjanum. Tá ið Fremad Amager legði seg framum 2-1, átti Andrew av Fløtum næstsíðsta fótin, og um hann hevði havt verið heppin, so hevði hann skorað í hvussu so er eitt mál afturat, tí hann hevði góðan møguleika, tá ið støðan var 4-2.

Andrew var á vøllinum allar 90 minuttirnar, og tað sæst á øllum brøgdum, at hann er vorðin lyklaspælari.

Í Lyngby var føroysk uppgerð, sum endaði 1-1. Lyngby legði seg á odda beinanvegin móti Frem. Málskjútti var Christian Lamhauge Holst, og hann hevði eina løtu seinni góðan møguleika at økja um leiðsluna.

Tað eydnaðist ikki, og tá ið tað restaðu níggju minuttir javnaði Frem til 1-1. Jón Rói Jacobsen var alla tíðina í miðverjuni. Hann hevði onkra roynd móti mótstøðumálinum, eina ferð blokeraði hann góða roynd hjá mótstøðumonnunum, eina ferð var um reppið, at hann kostaði eitt mál, og hann legði eisini upp til góða Frem roynd. Jón Rói fekk gult kort.

# FH er longu meistari

**Teir á Hafnafirði tryggjaðu sær meistaraheitið, tá ið teir vunnu á heimavølli móti Vali, sum framvegis er næstfremst**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Føroyska íslettið var ikki so ógvuliga stórt sunnudagin, tá ið fimtanda umfarið í Íslandi varð avgreitt. Bæði Símun Samuelsen og Rógvi Jacobsen vóru skiftir inn í 2. hálvleiki. Símun kom á vøllin í Keflavík beinanvegin eftir steðgin, tá ið Keflavík tapti 1-0 móti ÍA, og Rógvi Jacobsen spældi síðsta korterið, tá ið KR á heimavølli vann 3-1 á Grindavík.

Hóast tað resta trý umfør, so hevur FH longu endurvunnið meistaraskapin. Sunnudagin høvdu teir á Hafnafirði vitjan av Vali úr Reykjavík, sum er næstovast. FH vann 2-0. Tað bar við sær, at teir hava 45 stig. Valur hevur 31, og tað eru bara trý umfør eftir at spæla. Harvið er greitt, at FH er meistari.

Tað er eisini greitt, at bæði KR og Keflavík fara at halda fram í bestu deildini. Þróttur tapti 2-0 í Oyggjunum, og harvið eru møguleikarnir hjá teimum at endurnýggja uppihaldsloyvið í bestu deildini rættuliga smáir. Grindavík tapti 3-1 á útivølli móti KR, og teir eru eisini illa fyri. Þróttur hevur 10 stig, Grindavík hevur 12 stig, og ÍBV hevur 16 stig undan trimum teimum síðstu umførunum. Talan er um tveir beinleiðis niðurflytarar.

Fram og Fylkir skuldu í gjárkvøldið spæla síðstu uppgerðina í 15. umfarinum.